## Landsdystur á Rás1

Leygardagin spælir føroyska U21-landsliðið dyst móti Albania. Dysturin verður spældur klokkan 13 á Svangaskarði, og her verður setningurin hjá føroyingunum at fáa í minsta lagi eitt stig, sigur Heðin Askham, landsliðsvenjari. Rás1 hjá Televarpinum sendir beinleiðis frá dystinum.

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

## Beckham aftur á landsliðnum

Eftir at hann ikki hevur spælt seinastu fýra landsdystirnar, verður David Beckham aftur at síggja á enska landsliðnum, sum leygardagin spælir venjingardyst móti Eysturríki. Hóast hann ikki hevur spælt nógvar dystir í seinastuni, so fær Davic Beckham við hesum møguleikan at spæla sín landsdyst nummar 98. Dysturin er seinasta fínpussingin hjá Steve McLaren, landsliðsvenjara, áðrenn Ongland mikudagin spælir avgerandi dystin í undankappingini. Tann dysturin er á heimavølli móti Kroatia.

# Klaksvíkingar ruddaðu borðið



*Í sambandi við 18. kappingina um Haldor Holm steypið vitjaðu spælarar og dómarar á grøvini hjá Haldor Holm.*




*Teir tríggir klaksvíkingarnir, sum gjørdust nr. 1, 2 og 3 í Haldor Holm Cup, Kristian Sune Høgnesen, Hallur Joensen og Sonhard Johannessen.*

**- og vunnu bæði gull, silvur og bronsu í ársins fyrstu stóru billardkapping, Haldor Holm Cup**

**BILLARD**
*Tíðindaskriv*
*Myndir Jan Müller*

Hetta er tíðin, tá billardkøirnar verða tiknar fram aftur eftir drúgvan steðg. Næstseinasta vikuskifti var fyrsta stóra billardkappingin leikt í Klaksvíkar Klubba. Talan er um árligu Haldor Holm Cup, har fimm av landsins bestu spælarum dystast móti hvørjum øðrum. Ikki heilt óvæntað fóru allar medaljurnar til klaksvíkingar. Tá avtornaði var tað sum ikki einaferð Kristian Sune Høgnesen, sum gjørdist vinnari. Hann hevði nærum 30 eygu í meðal, hevði besta dystin uppá 868 eygu og besta umfarið uppá 280 eygu. Í hølunum á honum kom Hallur Joensen, sum hevði 26 eygu í meðal, og nr. 3 varð enn ein norðingur, Sonhard Johannessen við 22 eygum í meðal. Jan Müller gjørdist nr. 4 og Niels Nielsen nr. 5.

Kappingin um Haldor Holm steypið byrjaði longu í 1989, tvey ár áðrenn Haldor Holm doyði. Steypið varð latið av Billardsamband Føroya fyri at heiðra stóran áhugan og stuðulin Haldor Holm lat billardspælinum.

Steypið kann ikki vinnast men skal hava fastan bústað í Klaksvíkar Klubba. Vinnarar øll hesi árini við undantaki av ár 2000, tá tað ikki varð spælt, eru Hendrik Petersen 7 ferðir, Kristian Sune Høgnesen 4 ferðir, Jan Müller 3 ferðir, Rene Sørensen 2 ferðir, Eirikur Nielsen 1 ferð og Bjarni Skaalum 1 ferð.

Nú spælt varð fyri 18. ferð vitjaðu spælarar og dómarar á grøvini hjá Haldor Holm. Hann doyði 23. august 1991.

### FM-kapping

Føroyameistarakappingin fyri lið byrjaði seinasta vikuskifti. Tilsamans seks lið eru við í kappingini. Klaksvíkar Billardfelag luttekur við tveimum, Havnar Klubbi somuleiðis við tveimum og síðani Fuglafjarðar Billardfelag og Mimir við hvør sínum liði.

Havnar Klubbi 1 við Niels Nielsen og Jákup Nolsøe vann 12-4 á HK 2 við Høgna Højgaard og Jógvan Jørgensen. Klaksvíkar Billardfelag 1 við Kristian Suna Høgnesen og Halli Joensen førir 10-4 móti KB 2 við Sonhard Johannessen og Torkild Jacobsen. Ein dystur er eftir at spæla. Mimir og Fuglafjarðar Billardfelag spæla í desember.



*Í sambandi við 18. kappingina um Haldor Holm steypið vitjaðu spælarar og dómarar á grøvini hjá Haldor Holm*